gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Óvanligt semingstiltak

Dagurin er søguligur. Heima á Sandi fer løgtingsmaðurin, Páll á Reynatúgvu, at royna at fáa eina semju millum Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið um yvirmenninar umborð á nýggju sandoyarferjuni, Teistanum, sum nú hevur ligið einar trígjar mánaðir, síðani hon var liðug.

Tað sigst, at tingmaðurin fyri Sandoyar valdømi fekk hugskotið at royna at fáa eina semju millum landsstýrismannin, Karsten Hansen, og formannin í Skiparafelagnum, Ellint Abrahamsen, tá hann herfyri fekst við eina treiska ær, sum var sloppin út. Og gongdin higartil í málinum um Teistan bendir á, at bæði Ellintur og Karsten eru treiskir.

Nú kunnu fólk sjálvandi halda, at tiltakið hjá Pálli er ein happening, kanska fyri at seta seg sjálvan í fokus, men tey, sum hava ferðast í Sandoynni í summar, skilja væl, at løgtingsmaðurin tekur hetta stigið. Fólk í Sandoynni eru ikki bara ørg, men óð, tí tann nýggja ferjan ikki sleppur at sigla millum Skopun og Gomlurætt. Vit eru komin í bestu ferðatíð, og Sam klárar ikki at nøkta tørvin. Harafturat eru tað óivað mong, sum setast aftur, tí tey vita, at tað er avmarkað, hvussu nógvar bilar Sam kann taka.

Hinvegin er tiltakið hjá tingmanninum eisini eitt misálit á Fíggjarmálastýrið, sum hevur togast við Skipara- og navigatørfelagið síðani tíðliga í vár um sáttmálaspurningin fyri yvirmenninar umborð á Teistanum. Eyðkenni fyri Fíggjarmálastýrið hetta valskeiðið er, at tað hevur verið tungt at fingið sáttmálar undir land. Árið í ár er kortini eitt undantak, tí í vár eydnaðist at gera sáttmálar við flestu fekløg uttan arbeiðssteðgir ella verkfall.

At Skiparafelagið vil hava eitt lønarstig afturat, nú ein yvirmaður afturat skal vera á brúnni, er skilligt. Harafturat skal havast í huga, at hvørki skipari ella stýrimenn fáa eina fúrstaliga løn, hóast teir hava stóra ábyrgd og sigla við hundraðtals ferðafólki hvønn tann einasta dag. Lønin hjá teimum er helst niðan fyri lægsta lønarstigið hjá embætisfólkum í Fíggjarmálastýrinum.

Hóast semingstiltakið er óvanligt, er at vóna, at partarir fáa tosa seg til rættis millum sandoyingar, so henda ferjan sleppur í sigling. Málið um Teistan – fyri ikki at tosa um Brimil – er stór skomm, og millum tey mongu mál, sum aðalstýrini hava havt trupult við at loysa.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Góði Bjarti

**Hanna Joensen**



Eg havi við áhuga lisið tína grein “Slættasti sjógvur og brattastu bylgjur”. Eg havi lisið nógv sum tú hevur skrivað, og vanliga haldi eg teg vera mikið skilagóðan.

Tú er firtin um at Búskaparráðið kemur við eini metan um, at skattafyrimunurin til sjófólk átti at verið tikin av. Álitið hjá Búskaparráðnum er ikki gjørt við kenslum. Tað byggir bert á køld tøl og fakta.

Eg hevði skilt tað, um tað vóru tey lægstløntu, sum hava ilt við at fáa lønina at strekkja, tú vildi givið skattalætta, tí tey eru meira stressað av pengasorgum enn av, at tey kunnu vera heima “tá omman fer til gravar”.

Tú vevur okkara sjómenn inn í ein romantiskan retorik, sum hevði kunnað – við teimum røttu orðunum – brúkst til ein og hvønn samfelagsbólk. Tá tøl og fakta ikki kunnu nýtast, fer tú út í ein romantiskan orðavavstur, væl krydraður við sentimentalitet. Í staðin fyri at verja tíni sjónarmið við somu argumentum sum Búskaparráðið brúkar, vendur tú tær til kenslurnar hjá fólki í staðin fyri til skynsemið hjá fólki. “Flest øll dáma vit rós, flest øll dáma vit at fáa ein fíggjarligan fyrimun”. Megnar tú ikki at verja tíni sjónarmið á einum rationellum grundarlagi?

Men tá okkara størsti og ríkasti stættur – sambært Búskaparráðnum - fær skattalætta, er tað at seta kílar millum fólk. Hesin skattalættin verður goldin av t. d. teim lægri løntu, sum ikki fáa nakran lætta. Frammanundan fáa sjómenn longu minstuløn og telefonfrádrátt. Ella hvat við sjónarmiðinum at man fastheldur ein vinnubólk í einari vinnu, har tørvurin á arbeiðsmegi kanska broytist? Skal so hesin vinnubólkur ikki kunna skifta starv uttan at verða revsaður skattliga?

Okkara sjófólk skulu hava virðing, men ikki gerast til “luksus-almannaklientar”. Skulu tey hava ein fíggjarligan lætta skal tað gerast við at teirra arbeiðsgevari gevur teimum hann, ikki landskassin.

Við atliti til “tey 10 boðini” fari eg at minna teg á, at tað er eitt val at verða sjómaður. Eingin kann tvingast til at verða sjómaður. Hesin skattalætti liggur sum ein trojanskur hestur inni í skattaskipanini. Næst skulu teir hava kompensatión fyri ikki at síggja fótbólt “live”?

So skuldi landskassin givið viðbót ella skattalætta til tey sum arbeiða í heilsusektorinum fyri óneyðugt stress, skeivar arbeiðstíðir, tey á flakavirkjumn fyri kulda og kropsligt slit, SEV-monnunum fyri vandamikið arbeiði á hávetri. Er tað á henda hátt tit vilja hava skattin niður? Taka ein bólk fyri seg?

Slíkur politikkur skapar ikki samhaldsfesti í samfelagnum.

# Skerd vælferð- eitt ræðandi dømi

**Jenis av Rana**



Í skrivandi løtu er júst eitt ár og ein dagur liðin, síðani eg sendi ein innleggingarseðil á landssjúkrahúsið – eina umbøn um innlegging av eldri kvinnu til viðgerðar av sjúku, sum dagliga voldir henni trupulleikar, ið avmarka rørsluførleika hennara.

Nakrar dagar seinri fekk kvinnan skrivliga váttan um móttøku av innleggingarseðlinum, men tá mánaðir liðug, uttan at nakað annað hendi, vendi hon sær til mín aftur, eftir mínum tykki hevði hon longu tá víst óvanligt tolsemi. Men tíðin skuldi vísa, at varð hon vónbrotin, so varð hetta bert byrjanin.

Tvær ferðir hevur hon fingið dagfesting fyri innleggingardagin, men báðar ferðir er hon svikin, í skrivandi løtu er innleggjanin sett til einaferð í septembur – tá hevur hon sostatt bíðað í 15 mánaðir. Og meðan hon bíðar, versnar aktuelli livimátin og møguleikarnir fyri varðandi meini, sum sjálvt mest intensiva viðgerðin ikki megnar at bøta, økist dag frá degi.

### Mens græsset gror....

Tá fjølmiðlarnir, eftir næsta samráðingarumfar millum føroyingar og danir, bóðu um viðmerkingar til úrslitið (ella rættari – manglandi úrslitið), vísti eg Miðfloksins vegna á mótsøgnina í, at miðvíst varð arbeitt fyri risastórum yvirskoti í landskassanum, meðan samfelagið annars liggur í órøkt. Manglandi røktarpláss, metlangar bíðirøðir til barnaansing, niðurslitin strandferðslufloti, stongdar deildir í sjúkrahúsverkinum, vanrøkt av veikastu samfelagsborgarum okkara og so aktuella málið, sum bert er eindømi á økinum, alt sigur søguna um eitt stýri, hvørs arbeiðsførleiki, visiónir og ábyrgdarkensla tykjast slept uppá fjall – um hesi í heila tikið vóru til staðar frá byrjan.

Høvuðsmálið – fullveldið – sum øll orka úrslitaleyst er brúkt uppá, er komið á gravarbakkan, samstundis liggur samfelagið annars í órøkt, og hevði Skaparin ikki so ríkiliga havt sent signing sína á leiðir okkara farnu árini, høvdu livimøguleikarnir óivað verið heilt burtur.

Tí ein innilig áheitan frá Miðflokkinum á landsstýrissamgonguna um at skriva út nýval skjótast til ber. Tað vildi gagnað ikki bert gomlu, sjúku kvinnuni, men samfelagnum sum heild – ongin ivi um tað!


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Sjálvt ikki fívilin í fullveldismálum kann fjala yvir skommina

**- framhald um raðfestingarnar til almanna- og heilsuøki**

**Hans Pauli Strøm,**
*javnaðartingmaður*



Meðan atfinningarnar hegla niður yvir samgongupolitikkin á almanna- og heilsuøkinum, roynir landsstýrismaðurin í fullveldismálum sum ein annar fívil at gykla tann kalda veruleikan burtur: ”Nú eru raðfestingarnar greiðar”, skrivar hann í verjugreinini í síðstu viku – hóast tann stóri trupulleikin júst eru tær manglandi raðfestingarnar.

Púra skammleysur skoytir hann uppí, at ”Nústani fara føroyskir politikarar at raðfesta til eitt føroyskt vælferðarsamfelag” - hóast øll kenna ta himmalrópandi andsøgnina millum tørvin á almanna- og heilsuøkinum og tær rokaðu peningakisturnar hjá landsstýrinum, ein andsøgn sum bara er blivin størri og meira forargilig, nú hetta samgonguskeiðið gongur móti endanum.

### Hyklarí út um alt mark

Øll vita tað, at henda samgongan hevur eina einasta raðfesting fram um allar aðrar: at spara upp til fullveldisprojektið. Allur annar tørvur dvínur fyri hesum. Tí stóð eisini landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum so lotur og játtaði í Degi og Viku, at í hesum landsstýrisskeiðinum hava t.d. raðfestingarnar til ellis- og røktarheim verið 0,0. Tað tænir honum til æru, at hann royndi ikki at pynta uppá ta syrgiligu støðuna við umberingum og uttanumtosi.

Sama kann tíverri ikki sigast um hin landsstýrismannin, har hyklaríið fer út um alt mark. Hóast vanrøkt landsstýrisins av hesum økinum heldur fram nú á fjórði ári, skrivar hann, at tað ”eru serliga ellis- og røktarheim og íbúðarviðurskiftini hjá brekaðum, ið mugu ovast á dagsskránna”!

### Nú skal raðfestast til valagn

Fívilin í fullveldismálum heldur áfram at skriva uttan at smæðast: ”Vit hava brúkt 3 ár at fáa føroyska búskapin á eina trygga kós til fullveldi, og nú ber til at taka avgerðir og raðfesta tildømis ellis- og røktarheim, serforsorg og annað, sum stórur tørvur er á.” So, so: tað sum samgongun ikki megnaði í 1998, 1999, 2000 og 2001, tað skal nú vera valagnið uppundir komandi løgtingsval. Meira verður tað ikki til, tí samgongan fer neyvan at lívbjarga sær longur enn til einaferð í heyst, tá fíggjarlógin fyri 2002 skal leggjast fram.

Teir 3 flokkarnir semjast neyvan um eitt uppskot til nýggja fíggjarlóg, sum skal kunna standa fyri skotum í komandi valstríðnum. Tær forsinkaðu og fínu raðfestingarnar, sum serliga Sjálvstýrisflokkurin og Tjóðveldisflokkurin nú fara at koma við, fara tí ikki at verða annað enn valflesk.

### Landssjúkrahúsið lægri játtan til rakstur

Í greinini ”Minni blokkur, men meira til almanna-, heilsumál, útbúgving og mentan” biður landsstýrismaðurin okkum hyggja at, hvussu nógv samgongan hevur økt játtaninar til nøkur ”úrvald økir við tørvi”. Landssjúkrahúsið er eitt. Ja, hvussu er við tí ?

Frá 1997 til 2001 hækkaði játtanin úr 213 til 233 mió.kr., tað er 9,4%. Men í sama tíðarskeiði hava kostnaðarhækkingarnar verið tað dupulta. So í veruleikanum røkkur játtanin styttri í dag enn fyri 4 árum síðani. Tí er leiðslan noydd at spara og klípa burturav allastaðni. Tí verða eisini bíðirøðirnar longri, og tí eru vit eisini framvegis vitni til, at heilar deildir á Landssjúkrahúsinum verða stongdar um summarið og viðhvørt eisini um jólini, fyri at fáa endarnar at røkka saman. Hetta sigst at spara Landssjúkrahúsinum einar 60-70 mió. um árið.

### Játtanin til tól svarar ikki til tørvin

Landsstýrismaðurin reypar av at 8 mió. eru settar av til medicoteknisk tól í 2001. Men hvussu langt røkka 8 mió., eisini tá hugsað verður um at smb. fíggjarlógini skal henda játtanin eisini verða til sjúkrabilar?

Í 2000 var bráðfeingis tørvurin til medicoteknisk tól gjørdur upp til 15 mió. kr. Og árligi tørvurin síðani 10 mió. kr. Men hvat varð játtað? Jú 3,9 mió.kr í 2000 og 8 mió í 2001. Tvs. at minni enn helvtin av staðfesta tørvinum er játtað.

### Íløgur til landssjúkrahúsið

Landsstýrismaðurin vísir á, at 35 mió. kr. eru settar av til íløgur til Landssjúkrahúsið. Men hvussu langt røkka 35 mió.kr.?

### Íløgutørvur

| | |
|---|---|
| Útbyggingar | 123 mió. kr. |
| Umbygging | 44 mió. kr. |
| Umvælingar | 208 mió. kr. |
| Viðlíkahald | 68 mió. kr. |
| Brunatekn.krøv/ útgerð | 75 mió. kr. |
| **Tilsamans** | **518 mió. kr. u.mvg** |

Eftir hesi ætlan, so koma tað at ganga 15 ár við eini áhaldandi bygging á Landssjúkrahúsinum fyri at koma á mál, um árliga játtanin verður hesar 35 mió. kr. um árið !

### Tørvandi bústaðir hjá brekaðum

Landsstýrismaðurin vísir á at játtanin til serforsorg er økt úr 63 mió. í 1997 til 77 mió. í 2001. Men hetta svarar ikki til nógv meir enn kostnaðarhækkingina, sum verið hevur í sama tíðarskeiði. Hinvegin er lítið gjørt fyri at bøta um tað syndarligu vanrøktina av serliga íbúðarviðurskiftunum hjá samfelagsins veikastu, hjá menningartarnaðum, sálarsjúkum, rørslutarnaðum og øðrum, sum bera brek. Í kanning eftir kanning er staðfestur ein alstórur men ónøktaður tørvur á hesum øki.

Í fyrispurningi hjá Katrin Dahl Jakobsen til Helenu Dam á Neystabø varð út frá hesum kanningum víst á, at tað er ein bráfeingis tørvur fyri 42 búplássum til hesar samfelagsborgarar, og síðani fyri eini 80 plássum tey komandi 10 árini. Serforsorgin hevur eisini sjálv gjørt eina ætlan, har tað er neyðugt at útvega 43 búpláss tey næstu fimm árini, og av hesum eru tey 20 skrásett sum bráfeingis tørvur, tvs. at seta í verk beinanvegin.

Kostnaðurin av hesum kann metast til 15 mió. í árligum rakstri og 25-30 mió. í íløgum. Landsstýrið hevur sett 8,5 mió av – harav meginparturin er til eitt projekt frá undanfarna landsstýri, nevnliga autistaheimið í Klaksvík, sum langt síðani átti at verið fingið frá hondini. So skal nakað spyrjast burtur úr ætlanini hjá serforsorgini, skulu heilt aðrar raðfestingar til enn tær, sum hetta landsstýrið hevur megnað.

### Tørvandi ellis- og røktarheim

Her er tann nakni veruleikin, at hóast ovurstóra tørvin hevur hetta landsstýrið ikki útvegað eitt einasta ellis- og røktarheimspláss. 100-tals familjur eru komnar í neyðstøðu av hesum, og tey kommunalu sambýlini eru noydd út í óforsvarligt virksemi við at noyðast at taka óhjálpnar røktarsjúklingar framum í bíðirøðina.

Nei, her er als onki at reypa av, hóast játtanin til eldrarøktina hesi 4 árini er økt úr 140 til 185 mió.kr. Tí umframt kostnaðarhækkingina kemur útreiðsluvøksturin av, at kommunurnar hava tikið stig til at bygt nøkur sambýli, og skal landið gjalda ein part av hesum.

Íløgutørvurin til ellis- og røktarheim er mettur til 300 mió.kr., og haraftrat øktar rakstrarútreiðslur upp á 100 mió.kr. um árið. Og hvat er játtanin hjá landsstýrinum? Jú, eitt trillrunt 0. Og tað var hon í 1998, 1999, 2000 og 2001.

Hvat skal man so hugsa um landsstýrismannin í fullveldismannin, tá hann skrivar: ”Hetta ber nústani til at gera nakað veruliga við nú, tí at búskaparpolitikkurin hevur verið so miðvísur. Vit kunnu nú sum heild fáa trivnað, áræði og nógv størri samstarv at blóma í okkara almanna- og heilsuverki...”??? Er hetta ikki at spotta fólk upp í teirra opna andlit?

### Men miðfyrisitingin hevur aldrin havt betri dagar...

Nei, ikki finna vit tann stóra og blómandi trivnaðin í okkara almanna- og heilsuverki. Men tað má so avgjørt vera í miðfyrisitingini, at trivnaðurin blómar, so sum henda fullveldissamgongan hevur hjúklað um hana í síni stjórnartíð. Tí soleiðis hevur samgongan raðfest hesa miðfyrisitingina, hægri og hægri, ár eftir ár:

sí talvu niðast í greinini!

Miðfyrisitingin er Løgmansskrivstovan (sum umframt løgmann eisini hýsir vara-) og stýrini: Fíggjar-, Fiski-, Vinnu-, Olju-, Menta-, Almanna- og heilsumálastýrið.

”Talan er um eina sanna kollvelting í raðfestingunum á fíggjarlógini”, skrivaði landsstýrismaðurin í fullveldismálum. Tó haldi eg ikki at tað var hendan ovurraðfestingin av miðfyrisitingini, hann hugsaði um.

Henda samgongan hevur ikki røkt sínar mest einfaldu sosialu skyldur. Hennara tíð er farin, og størsta gagn hon kann gera landi og fólki, er at viðurkenna sítt fallitt og fara frá sum skjótast.

**Raðfestingin av miðfyrisitingini, mió. kr.**

| 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | vøkstur 1997-2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| 30,3 | 32,2 | 48,3 | 52,8 | 60,1 | 98 % |

# Reytt kort til varmakelduróðurin

**Vagnur Michelsen**



Í seinastuni hava nógv hundrað ungfólk verið til próvtøku, og fleiri teirra síggjast í gøtunum við studenta-, HF- ella HH-húgvum. Tey hava staðið eina roynd og fingið prógv.

Leygardagin var kappróður á Fuglafirði. Og høvdu persónarnir, sum stóðu fyri starvinum verið til roynd í at leggja út startirnar og starta kappróðrarbátar, so høvdu viðkomandi ikki fingið »húgvuna« henda dagin. Tí avrikið í Fuglafirði leygardagin var út av lagi vánaligt, ella rættari sagt pínligt. 03 í karakteri fyri at leggja út fasta startin er hóskiligt.

Tað gongur ikki at geva streyminum skyldina, tí rák hevur allar tíðir verið millum oyggjarnar.

Kappróðurin skuldi byrja klokkan trý. Klokkan hálvum fimm vóru tríggir av róðrunum avgreiddir. Men so hendi tað, sum fyri alt í verðini ikki má henda. Roynt varð í hálvan annan tíma at flyta fasta starvin frá 1000 metrum út á 1500 metrar. Hetta miseydnaðist og førdi til, at tað tók næstan fýra tímar at avgreiða kappróðurin á varmakeldu.

Á jóansøku tók tað tveir tímar at avgreiða róðrarnar.

Avrikið í Fuglafirði leygardagin er serliga ein háðan ímóti okkara róðrarfólki. Síggi fyri mær manningina á einum 10 mannafari koma rennandi oman til bátadráttin. Teir høvdu hitað upp og vóru klárir at fara í bátin. Genturnar høvdu júst róð, og nú var tíð hjá monnunum at fara í bátarnar og fyrireika seg til róðurin.

Menninir í 10 mannaførunum sótu í vátveðri og bíðaðu í tveir tímar í bátunum áðrenn teir sluppu at rógva. Tveir tímar eru meira enn ein heilur fótbóltsdystur, minnist til tað.

Manningarnar á seksmannaførunum við monnum bíðaðu í hálvan annan tíma úti á málinum.

Hetta er langt uttan fyri øll menniksja- og ítróttarlig mørk, sum kunnu bjóðast okkara rógvarum, sum venja fýra-fimm ferðir um vikuna og ganga við lív og sál upp í ítrottin.

Minsta krav til hvønn FM kappróður má vera:

1. At nýttir verða tveir fastir startir á hvørjari FM stevnu. Ein fastur startur skal liggja á 1000 metrum og ein startur á 1500 metrum, áðrenn bátarnir koma á róðrarøkið.

Tá ið róðrarnir á 1000 metrum eru avgreiddir, er longu klárt at fara út á 1500 metrar. Ímeðan róð verður 1500 metrar, verður 1000 metrastarturin fluttur út á 2000 metramálið. So einfalt er tað. Í Fuglafirði var bara tann eini fasti starturin.

2. At Róðrarsambandið hevur eina fasta manning, sum leggur út allar fastu startirnar á FM stevnunum. Hvussu í víðu verð skulu menn fáa royndir at leggja út startir, tá ið hetta í summum førum bert verður roynt annað ella triðja hvørt ár?

3. At Róðrarsambandið ásetur, hvussu langa tíð ein róður í mesta lagi kann vara, áðrenn ítróttarliga virðið er burtur. At sita vátur í einum báti og bíða í tveir tímar kann ikki góðtakast.

4. At hugsað verður um áskoðaran, sum hevur goldið 50 krónur at síggja kappróðurin. Nógvir áskoðarar fóru til húsa aftur leygardagin, og hvat er kappróður uttan áskoðarar?